## DAGSINS MEINING

# Samgongu(ó)møguleikar

Minni enn 5 mánaðir eru til løgtingsval. Hetta verður eitt tað mest spennandi valið í mong ár. Fullveldispolitikkurin sleppur av álvara at standa sína roynd. Valið kann sigast at verða ein seinkað fólkaatkvøða, sum verandi samgonga hevur tosað nógv um men einki gjørt við. Flestu fólk vilja ikki eina víðgongda fullveldiskós. Og heldur ikki eina víðgongda sambandskós. Samumtikið vilja flest eina miðleið. Helst verður tað eisini hon, ið verður úrslitið av valinum. Føroyingar vilja hava størri sjálvstýri. Ósemjan snýr seg um ferðina.

Valið kann gerast sera javnt millum blokkar og kunnu vit fáa eina støðu, har tað verður torført at seta saman samgongu. B og C tykjast tó at kunna vinna valið einsamallir. Her snýr tað seg nógv um, hvør verður størstur. Ein møguleiki er A,B og C. Hann er sannlíkur, tó at tað kann vera trupult hjá C, fær hann ikki løgmann, at skula samstarva við 2 borgarligar flokkar. Enn ein møguleiki er C og E, nakað, sum tó tykist sera ósannlíkt í verandi støðu. Enn ein samgongumøguleiki er A,C og E. Men hann kann gerast ringur at svølgja hjá C verður hann ikki størstur.

Sjálvandi kunnu smærru flokkarnir, koma teir á ting, skapa nýggjar møguleikar. Fáa teir ikki umboð, er mest sannlíkt við sterkari trýflokkasamgongu. E hevur í mongum førum telvað seg í skák mát hvat samgongumøguleikum viðvíkur. Tá hjálpir støddin lítið. Neyvan fær hann meira enn tey 25%. Nýggja leiðslan hevur ikki viljað rikið semjusøkjandi politikk, og tá kann koma henni aftur um brekku. Vil B leggja á eina meira sjálvstýrissinnaða kós er ikki óhugsandi við A,B og C.

Løgmaður hevur eina sera torføra uppgávu fyri framman verður hugsað um at marknaðarføra sín egna flokk til valið. Øðrumegin er hann løgmaður fyri alt Føroya fólk, hinumegin skal hann fáa veljararnar aftur í foldina við einum meira hóvligum politikki. Hvat hann enn ger missir hann á vengrunum. Men hann má velja. Niðurstøðan á landsfundinum um at samstarvið við E eigur at halda fram kann gerast eins katastrofalt fyri valúrslitið sum hetta samstarv longu hevur skatt flokkin.

Eingin ivi er um, at siðiligi og høviski atburður løgmans hevur givið honum undirtøku millum mangar føroyingar. Kortini gongur flokkurin aftur. Løgmaður má síggja til, at flokkur hansara finnur seg sjálvan aftur skal hann ikki fara í spønir. Diplomatisku útsagnirnar sum "Bíða nú", "Tað skal nokk ganga" ol. duga ikki longur. Hann má fáa flokkin inn aftur á kósina, sum hvørki er samband ella fullveldi, men ein leið, sum í mongum er tann sama sum hon hjá C. Skulu vit hava eina samgongu, sum tekur skilabestu avgerðirnar í ríkisrættarliga spurninginum má hon tí vera A og C saman við antin B ella E. Hvønn veldst um, hvør verður meira mið- og semjusøkjandi.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Flogvøllurin problembarn Fólkafloksins

**Frank Davidsen**
*Sørvágur*



Vánaliga úrslit Fólkafloksins á fólkatingsvalinum og tá serliga í Vágum, hevur loypt rættuligan hvøkk á løgmann eins og aðrar í flokkinum, men sigast kann, at soðið er sera tunt í teirra argumentatión viðvíkjandi tí vánaliga valinum. Og fyri at bera í bøtuflaka, tí Fólkaflokkurin hevði eitt so syndarligt fólkatingsval í Vágum, so roynir løgmaður at kasta torvmold í eyguni á veljaranum. Tað, sum alt Føroya fólk, ikki minst vágafólk, hesi skjótt 4 árini hava havt varhugan av, nevniliga at eingin útbygging av Vága Floghavn fór at verða, tað gjørdist tíverri veruleiki takkað verið Finnboga Arge og Bjarna Djurholm.

At so flogvallarovastin segði tað, sum alt Føroya fólk visti frammanundan, skuldi brúkast politiskt av løgmanni, sum nú knappliga beint undan løgtingsvalinum sigur seg punktera 4 ára arbeiði hjá tveimum landsstýrismonnum floksins, ja, skil tað hvør ið vil.

Eftir stendur so, at meðan sitandi flogvallarovasti hevur roynt at verja borg við skilagóðum argumentum um mótvegis dønum, so hevur Fólkaflokkurin við teirra støðutakan forhálað og útsett eina bráðneyðuga útbygging av Vága Floghavn. Og stóri spurningurin er, um henda støðutakan at halda Vága Floghavn á status quo bæði tekniskt og í aðrar mátar, kemur at geva mótstøðumonnum av Vága Floghavn tey kort á hondina, teir hava arbeitt fram ímóti seinastu 15 árini. Livst so spyrst.

# Fólkafloksleiðin er føroysk og vælgongd

**Jógvan við Keldu,**
*løgtingsmaður*



Soleiðis sum Fólkaflokkurin var krumtappurin í fimtiárunum við "endurnýggjan av skipaflotanum" sum gjørdi, at føroyingar fingu framkomnan fiskiflota, soleiðis fer flokkurin eisini framhaldandi at syrgja fyri eini "klókari" og betri skattaskipan.

Føroyska samfelagið er ígjøgnum tíðirnar farið um tindar og skørð og soleiðis í djúpar dalar.

Tílíkt hendir ikki bara í okkara lítla samfelagi, men sanniliga eisini í londunum uttan um okkum. Av tí, at land okkara er lítið og at vit seinastu 100 árini bert hava havt fiskin á at líta, er tað viðkvamt, tí hava samfelagsárinini, upp- og niðurgongdartíðirnar, virka bæði skjótari og sterkari á okkum.

**Krumtapurin í samfelagnum**

Hetta sá Fólkaflokkurin eitt nú í fimtiárunum, tá hann var krumtappurin í at seta á stovn hugtakið "endurnýggjan av skipaflotanum".

Hesi árini gjørdu, at føroyski sjómaðurin fekk møguleikarnar at fara úr slupptíðini og inn í ein nýmótans fiskiskipaflota.

Í fleiri ár høvdu vit tá sæð eitt nú norðmenn koma fram við Føroyum við nýmótans línuskipum og týskarar við sínum framkomnu hekkutrolarum, sum eisini komu í føroyskar havnir eftir føroyskum mannsskapi. Føroyskum sjómonnum sum tá, eins og í dag, vóru væl umtóktir.

At byggja á søguna er bæði rætt og gott, men einsamøll leiðir hon okkum ikki fram í oddin. - Tíðir broytast, vinnan verður umskipað, og fólk okkara gerst sjálvbjargið, bæði innan verandi fiskivinnu á sjógvi so væl sum á landi, men so sanniliga eisini á øðrum økjum.

**Ung og hugsjónarrík**

Okkara ungu og okkara uppvaksandi ættarlið eru opin fyri nýggjum leiðum, og eru ikki bangin fyri at taka við avbjóðingum, tað veri seg innan ídna, tænastuvinnum við KT-framtøkum og heldur ikki eru tey rædd fyri at taka við avbjóðingum innan oljuvinnuna.

Hetta hevur Fólkaflokkurin sæð, tí hevur hann lagt og leggur enntá meiri doyðin á at skapa eitt liviligt samfelag, har fólkið sum arbeiðir, vinnur pening og setur føtur undir egið borð, sleppir undan tyngjandi og kostnaðarmiklum skattum og avgjøldum serstakliga í fleiri liðum.

**Gjalda skatt bert av fyrstvunnu krónuni.**

At skattalætti er givin í hesum samgongutíðarskeiði, kunnu Føroyar fegnast um, samstundis sum eg vil gera vart við, at uttan Fólkaflokkin, varð eingin skattalætti.

Eg fari í hesum viðfangi at vísa á Caragata-álitið, sum kann gerast ein týdningarmikil leiðbeinari og sum Fólkaflokkurin fekk til vega, og varð lagdur Føroyafólki til skjals og nýtslu meðan Finnbogi Arge sat sum landsstýrismaður, og sum Bjarni Djurholm, landsstýrismaður hevur styrkt.

Soleiðis sum Fólkaflokkurin var krumtappurin í skipanini við "endurnýggjan av skipaflotanum" í fimtiárunumn, sum gjørdi, at føroyingar fingu líkinda skip, soleiðis er Fólkaflokkurin eisini krumtappurin í samband við at geva fólkinum lættari lívsmøguleikar við einum "klókari" og betri skattaskipan.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Fólkið vil broytingar, sigur javnaðarflokkurin

**Edmund Joensen**



Undan fólkatingsvalinum hevði Javnaðarflokkurin heilar síður við lýsingum í Sosialinum. Summar vóru beinleiðis álop á Sambandsflokkin og villeiðandi í heila tikið.

Í einari av valgreinunum varð undir stórari yvirskrivt "Fólkið vil broytingar" m.a. sagt soleiðis: "at tað var stívrendi afturhaldspolitikkurin hjá Sambandsflokkinum, sum var orsøkin til at loysingar-ætlanin kom í eyga."

**Hvørjar broytingar vil fólkið?**

Sjálvandi ganga øll inn fyri broytingum. Samfelagið broytist undir øllum umstøðum. Í spurninginum um samband/loysing gongur Sambandsflokkurin inn fyri sínum nýskipanaruppskoti, meðan Tjóðveldisflokkurin gongur inn fyri loysing skjótast gjørligt. Aftaná seinasta løgtingsval vaknaðu flestu fólkafloksveljarar og sjálvstýrisveljarar við kaldan dreym. Knappliga og uttan ávaring gingu Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin á odda fyri at kvetta við Danmark. Hetta var onki krav frá "fólkinum". Teirra partur av fólkinum var ovfarið. Ongin var meira ovfarin enn Tjóðveldisflokkurin, sum var um at verða yvirhálaður í innaru koyribreytini.

Tá loysingarsamgonguskjalið hjá Fólkaflokkinum, Sjálvstýrisflokkinum og Tjóðveldisflokkinum bleiv almannakunngjørt, almannakunngjørdu verandi formaður Javnaðar-floksins, Jóannes Eidesgaard, og undanfarni formaður Javnaðarfloksins, Atli Dam, at teir tóku heilt og fult undir við forsíðuni í samgonguskjalinum. Teir báðir vildu eisini loysa beinan vegin.

Men hvat segði teirra partur av "fólkinum"? Meðan veljarar Fólkafloksins og Sjálvstýris-floksins yptu øksl og vóru bilsnir, tað hava teir verið so mangan, so lótu veljarar Javnaðarfloksins sær ikki alt lynda. Baklandið gjørdi uppreistur, og Javnaðarflokkurin gjørdist aftur ein sam-ríkis-flokkur – í hvussu so er offisielt.

**Positivar og konstruktivar broytingar.**

Stevnuskrá Sambandsfloksins sigur svart uppá hvítt, at flokkurin vil gera tær broytingar í ríkisrættarligu viðurskiftunum sum tæna føroya fólkið best. Kann tað sigast týðuligari? Sambandsflokkurin er einasti flokkur, sum hevur eitt ítøkiligt uppskot um broytingar í einum varðveittum ríkisfelagskapi. Vit hava eitt uppskot til nýskipan sum ítøkiliga sigur hvat vit vilja.

Sambandsflokkurin hevur ferð eftir ferð sett politisku flokkunum spurningin: hvørjar ítøkiligar broytingar ynskja tit. Tjóðveldisflokkurin sigur loysing beinanvegin. Og aftaná seinasta løgtingsval siga Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin tað sama.

Javnaðarflokkurin, í hvussu so er leiðsla floksins, gav aftaná seinasta løgtingsval eitt líka greitt svar sum Fólka-flokkurin og Sjálvstýrisflokkurin, men hevur broytt støðu, tí "tann parturin av fólkinum" ikki ynskti hesa broyting.

Nú koyrir Javnaðarflokkurin fram við einari sonevndari Sjálvstýrislóg. Hví ikki siga "fólkinum" frá hvat hendan lógin gongur út uppá. Tá hevði fólkið verið ført fyri at tikið støðu til um tað ynskir tykkara broytingar.

Vit eru fullvísir í, at føroya fólk gongur inn fyri okkara broytingum - tær eru festar á blað. Ongin ivi er um, at summir føroyingar ganga inn fyri størri broytingum enn vit hava skotið upp. Men hvørki tit ella vit vita um fólkið gongur inn fyri tykkara broytingum. Tær eru ikki kendar. Fólkið veit ikki hvat tað er tit vilja.

**Tá tikið verður saman um**

Veruleikin er, at ein partur av fólkinum ynskir loysing. Ein annar og størri partur av fólkinum ynskir at varðveita ríkisfelgsskapin.

Tann parturin av fólkinum, sum ynskir loysing, fer til komandi løgtingsval at velja Fólkaflokkin, Sjálvstýrisflokkin ella Tjóðveldisflokkin.

Ongin føroyingur kann vera í iva um, at Sambandsflokkurin gongur inn fyri at varveita ríkisfelagsskapin, dagførdan við nýskipanaruppskoti Sambandsfloksins, og allar teir stóru fyrimunir, sum hesin gevur føroya fólki.

Í staðin fyri at brúka heilar blaðsíður til onkisigandi rakstrarróp, sum t.d. at "fólkið vil broytingar", eigur Javnaðarflokkurin stutt og treitt at almannakunngera, hvørjar ítøkiligar broytingar Føroya Javnaðarflokkur ætlar at fremja.

Føroya fólk krevur eitt svar, og vit, sum ætla okkum í samgongu næstu ferð, ynskja eisini eitt svar.

# Loysingarfólk eiga at hugsa seg umaftur, tí tit eru lumpað av tykkara egnu

**Marjus Dam**
*løgtingsmaður*



**Í beinleiðis spurningi frá undirritaða í sending í RÀS 2 til umboð Fólkafloksins, Jógvan á Lakjuni, løgtingsmann, svaraði hesin, at hann ongar konsekvensútgreiningar hevði sæð av risaskerjingini av ríkisveitingini uppá 400 milliónir krónur, ið hann sjálvur atkvøddi ja til.**

Nú trúgvi eg, at Jógvan á Lækjuni segði satt, og tað skal hann hava takk fyri. Men eisini trúgvi eg, at ongin av samgongulimunum, ið atkvøddu hesa risaskerjing ígjøgnum Løgtingið, høvdu sæð nakra konsekvensútrokning fyri føroyska samfelagið. Í samband við hesa skerjing spurdu andstøðulimir fer eftir fer um slíkar útrokningar. Men ongin slík var víst okkum. Heldur ikki uppá fyrispurningar í nevnd. So slíkar útrokningar eru so ikki ein partur av støðinum undir at atkvøða hetta uppskot ígjøgnum - við bindi fyri eyguni. Og so tosa hesir um at taka ábyrgd!

**Ábyrgdarloysi og loysing hond í hond:**

Ikki haldi eg, at tað er skeivt at siga, at loysingarpolitikkurin, ið samgonguflokkarnir standa fyri er fullkomuliga ábyrgdarleysur. Tí sjálvandi skulu bæði lítlar og stórar avleiðingar av hesum skerjingum greinast niður í minsta lut. Hvørja ávirkan fær tað fyri føroyska samfelagið, at gera slíkar skerjingar í inntøkuni ivir eitt styttri ella longri áramál? Hvussu verða rakstrar, viðlíkahalds og íløgumøguleikar ávirkaðir? Og tá er serliga gott at vera varin í metingum. Um førleikin at gera slíkar metingar ikki er til staðar, eiga tær at verða gjørdar av slíkum, ið hava hendan førleika. Tí annars kann vanligi føroyingurin aftur rokna við at fáa eina risarokning fyri politiskan kleyvaraskap.

At vilja loysa er ein erlig søk. Men at fremja eina skilaleysa skerjing fyri at loysa, tá ein meiriluti av føroyingum eru ímóti hesum - tað er ódemokratiskt.

Men at fremja øll hesi viðurskiftir, bæði uttan at spyrja føroyingar eftir og uttan konsekvensútrokningar yvirhøvur, tað er so ábyrgdarleyst, at ein noktar næstan at trúgva, at løgtingslimir fremja slíkt, bert fá ár eftir at vit, orsaka av politiskum ørskapi fóru fallit.

Eitt er vist Loysingarsamgongan siglir við fullari fer ímóti loysing. Tað er sera ótrygt at vita, at ongin á brúnni tykist duga minsta sjómansskap. Helst liggja allir á brúnni á dúrkinum sjúkir av sjóverki - óarbeiðsførir. Teir síggja ikki flúrin fyri framman - ið øll á dekkinum síggja týðuliga.

Í løtuni er støðan sera álvarslig í Føroyum. Yvirmennirnir megna ikki uppgávuna! Føroyingurin verður enn einaferð lumpaður - ikki av útlendingum, men av sínum egnu. Hóast nógv verður gjara út við valfleski, ið peningur ikki er til at gjalda í veruleikanum. Tað er tað versta.

Betri hevði verið at gjørt uppbyggjandi broytingar innan ríkisfelagsskapin. Tað hevði gagna Føroyum almikið. Tað vil Sambandsflokkurin.

# Eina mia. frá vælferðini!

**Johan Petersen**

**Grundarlagið fyri, um eitt samfelag er eitt vælferðarsamfelag ella ikki, er m.a. um tað hevur eitt nøktandi heilsuverk. Prógv er seinastu dagar komið um tað, sum flestu føroyingar vistu: heilsuverk okkara er í skeljasori! Fyri nøkrum árum síðan vísti ein yvirlækni á Landssjúkrahúsinum á, at síðan vit sjálv fóru at umsita blokkstuðulin, er heilsuverk okkara afturútsiglt við einari milliard krónum. Og tað má svíða!**

Talað verður aftur og aftur av politisku flokkunum um, at vit skulu framhaldandi vera eitt vælferðarsamfelag. Men spurningurin er, um vit eru millum tey lond, sum kunnu kalla seg eitt vælferðarsamfelag. Í hvussu so er ikki, tá talan er um okkara heilsuverk. At hava eitt vælvirkandi heilsuverk er ein av fortreytunum fyri, um vit eru eitt vælferðarsamfelag.

**Psykolog sum stuðulspedagog**

At so at siga allar sjúkrasystrarnar á eini deild á Landssjúkrahúsinum siga seg úr starvi samstundis vegna ótolandi umstøður, er nóg greitt prógv um tað, sum flestu okkara vistu: heilsuverk okkara er í skeljasori. Og at leiðslan á sjúkrahúsinum kallar sjúkrasystrarnar til fundar og hevur psykolog við sum stuðulspedagog prógvar, at hon ikki er uppgávu sína vaksin. Hetta kann sammetast við súkklurnar hjá heimasjúkrasystrunum.

**Eina heila milliard afturútsiglt**

Fyri nøkrum árum síðan vísti ein av yvirlæknunum á Landssjúkrahúsinum á, at síðan vit fingu blokkstuðulsskipanina, har vit sjálv fingu loyvi at umsita danska stuðulin, sum skal tryggja okkum vælferðina, hevur heilsuverk okkara fingið eina heila milliard krónur minni, enn tað hevði fingið undir gomlu refusiónsskipanini! Og at tað má merkjast onkustaðni, sigur seg sjálvt.

**Ótíðarhóskandi útgerð**

Umframt manglandi starvsfólkanormeringar vísa sjúkrasystrarnar á, at útgerðin á deildini er gomul, slitin og ótíðarhóskandi. Havi sjálvur upplivað á røntgendeildini, at røntkan ikki vildi fungera. Tá ið hon so at enda aftur fekst at rigga, vísti tað seg at »blýggjmyndaplátan« ikki sat sum hon skuldi. Spurdi, um hesin elligamli teknikkurin framvegis bleiv nýttur og fekk at vita, at so var. Spurdi so, hvussu stórur tørvurin á røntgendeildindi var, fyri bert at koma upp á eitt hóskandi støði tekniskt sæð, og fekk at vita, at bert røntgendeildini tørvaði 30 mió. kr. Og at skilið er tað sama á øðrum deildum er eingin ivi um og hava vit nú eisini fingið prógv fyri.

**Megu endurreisa vælferðarsamfelagið**

At alt samfelagið var niðurpínt kreppuárini, kann góðtakast, men at vit í bestu búskaparligu árum nakrantíð og samstundis sum fullveldissamgongan sigur neitakk til út við 400 mió. kr., skulu uppliva eitt heilsuverk, sum ikki verður nútíðargjørt, kann als ikki góðtakast. Tí megu vit bert vóna, at verandi skaðasamgonga skjótast leggur frá sær og vit fáa eina nýggja samgongu, sum kennir ábyrgd sína og fer undir at endurreisa vælferðarsamfelagið aftur!